**Kristjan Árnason**

| | |
|---|---|
| **Fra:** | Eyðvør Mortensen |
| **Sendt:** | 17. september 2018 16:10 |
| **Til:** | Almannamálaráðið |
| **Cc:** | Marjun Magnussen |
| **Emne:** | Almannaverkið - Hoyringssvar viðv. Vælferðarlóg, Tvingsilslóg, Barnaverndarlóg og Eldralóg |
| **Vedhæftede filer:** | Hoyringssvar Vælferðarlóg.docx; Hoyringssvar Tvingsilslóg.DOCX; Hoyringssvar Barnaverndarlóg.docx; Hoyringssvar Eldralóg.DOCX; Yvirlit KT kostnaður.docx |

Hervið verða sendar viðmerkingarnar hjá Almannaverkinum til lógaruppskotini um Vælferðarlóg, Tvingsilslóg, broyting í Eldralógini og í Barnaverndarlógini.

Umframt formligu viðmerkingarnar hevur Almannaverkið nakrar viðmeringar um fíggjarligar avleiðingar av nýggja lógarverkinum.

Á s. 63 í uppskotinum um Vælferðarlóg verður samanumtikið sagt um fíggjarligar avleiðingar, at fyri at fáa eina vælvirkandi skipan, sum røkkur øllum borgarum sum hava tørv á tænastum, skal játtanin við tíðini hækka við uml. 64 mió. kr. Tað sær ikki út til, at fíggjarligar avleiðingar fyri BPA og fylgjaraskipan eru tiknar við. Almannaverkið metir, at hesar nýskipanir fara at hava hesar fíggjarligu avleiðingarnar:

| | |
|---|---|
| BPA: | 429 tkr |
| Fylgjaraskipan: | 5.720 tkr |

Leggjast skal afturat, at nýggja meira umfatandi ráðgevandi skyldan, sum Almannaverkið fær við lógaruppskotinum, væntandi fer at kosta í hvussu so er 2 sosialráðgevarastørv.

Almannaverkið hevur ikki í hesum hoyringssvari fyrihildið seg til, hvørjar fíggjarligar avleiðingar broytingarnar hava við sær fyri lógarbundnar útreiðslur.

Hjálagt er eitt yvirlit sum vísir mettu útreiðslurnar av neyðugum KT-tillagingum. Ein leyslig meting er, at tað í hvussu so er fer at taka 12 vikur frá lógin er samtykt at tillaga Heildarskipanina.

Vinaliga

**Eyðvør Mortensen, deildarleiðari**
**Fakdeildin**
**tlf. 347004**

almannaverkið

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Tórshavn, tann:** 14. september 2018
**J.nr.:** 002.K04-0071/18-1
(at tilskila í svari)

**Tygara skriv.:**

**Viðgjørt:** Elin Debes

**Hoyringsviðmerkingar til uppskot um broytingar í Barnavendarlógini**

Almannaverkið hevur tann 23. juli 2018 fingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd til hoyringar. Almannaverkið hevur hesar viðmerkingar:

§ 64a Kæra. Almannaverkið mælir til, at tað verður ásett, hvør kann kæra. Eru tað foreldur og/ella børn, og um børnini sjálvi kunnu kæra, er so nakað aldursmark, t.d. børn yvir 15 ár?

Mælt verður til, at ásetingin í § 66 í verandi lóg um kærurætt verður varðveitt, so tað er greitt, hvør kann kæra.

§ 39 stk. 3: í viðmerkingunum á s. 8 stendur, at í grein § 39 stk. 3 er ásett, at loyvt er at gera nýtslu av likamligari valdsnýtslu og at læsa børn ella ung inni í einrúmi, *ella tá tað er neyðugt fyri at røkka endamálinum við uppihaldinum.* Tað er ikki nevnt í § 39, stk. 3 at valdsnýtsla kann nýtast fyri a røkka endamálinum við uppihaldinum og eigur tað tí at vera sett inn í lógartekstin. Eisini eigur at verða viðmerkt í serligu viðmerkingunum á s. 8 sum dømi: "fyri at forða fyri álvarsligum skaða á heilsu og menning".

Á s. 6 um avleiðingar av uppskotinum í brotinum 2.14 stendur, at man skal leggja tilmæli um eftirlit við internet/telefon fyri tvingsilsnevnd sambært § 14 í tvingsilslóg. Her eigur at standa § 15.

Á s. 10 í serligu viðmerkingunum stendur um skráseting og fráboðan, at myndugleikin skal fráboðað foreldrum ella verja um skrásetta inntrivið seinast dagin eftir.

Almannaverkið mælir frá, at skyldan at fráboða foreldrum/verja áliggur stovninum. Tað er kommunan, ið varðar av barnaverndarmálinum og familjuni, og tískil metir Almannaverkið, at tað er skilabest, at tað er kommunan, ið boðar foreldrunum frá inntrivinum. Almannaverkið kann í slíkum førum senda fráboðanirnar víðari til avvarðandi kommunala myndugleika.

Harafturat við Almannaverkið vil mæla til, at ein áseting verður um, at heimild verður fyri at halda persóni undir 18 ár føstum til tess at forða honum í at fara frá stovninum, og at føra hann aftur á stovnin, tá tað er neyðsýnt grunda á sosialnámsfrøðiligu viðgerðina ella tað er eyðsýndur vandi fyri álvarsomum skaða á barnsins heilsu og menning vísandi til § 11, stk. 2 í tvingsilslógini.

Eisini vil Almannaverkið mæla til, at heimild verður at hava ávaringarskipan á barnaverndarstovninum til børn undir 18 ár vísandi til § 6 í lóg um tvingsil. Talan er um skipan, sum sigur frá, um hurðar/vindeygu vera latin upp um náttina. Ein ávaringarskipan kann t.d. fyribyrgja, at børn fara inn á kømur hjá øðrum børnum um náttina og gera seg inná tey. Hetta eru trupulleikar, sum koma fyri á barnaverndarstovninum, har fleiri børn búgva saman. Eisini kann talan vera um, at børn rýma út um náttina, og tá er gott hjá

starvsfólki at vita, at barnið er farið út. Skipanir finnast, har einstakar hurðar/vindeygu kunnu setast til og frá, so tað bert verður brúkt á teimum hurðum/vindeygum, har tað er neyðugt, soleiðis at tað ikki er sett til hjá børnum, har tørvur ikki er á at hava ávaringarskipan. Hurðar/vindeygu eru tá ikki læst, men ein følari er á sum sigur frá, um hurðin/vindeygað verður latið upp.

Um tað ikki ber til at víðka tvingsilslógini til eisini at fevna um heimild at halda barni føstum ella at føra barn aftur á stovn og at hava ávaringarskipan verður mælt til, at hesar ásetingar vera settar í barnaverndarlógina.

Vegna Almannaverkið

Eyðvør Mortensen
deildarleiðari

Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo